Føroyar eru komnar á oljukortið hjá A P. Møller

Føroyar nú á oljukortinum hjá A.P. Møller

Mærsk Olie og Gas vágar stórar íløgur í nýggjum økjum kring heimin. Eitt av framtíðar økjunum er Atlantsmótið eitt nú økið við Føroyar

JAN MULLER

Tað hevur altíð verið torført at fáa nakað at vita um ætlanir og støðuna hjá A.P. Møller, antin tað hevur snúð seg um olju ella okkurt heilt annað. Hetta er nakað, sum føroyingar, ið hava arbeitt hjá ella arbeiða hjá fyritøkuni, vita. Tað ræður um at spyrja sum minst. Tí spyrt tú fært tú lítið og einki at vita. Hetta er sum so politikkurin hjá hesi fyritøkuni. So kann ein halda, at hetta er gott ella ringt. Men soleiðis er og soleiðis verður tað.

Tó so, til tíðir verður lokið líkasum lyft uppfrá og tú sleppur at fáa eina fatan av, hvat hetta risastóra vinnusamtakið tekst við og stendur fyri og hvørjar ætlanir tað hevur - uttan at tað verður farið í út í smálutir.

Hetta verður m.a. gjørt í seinasta nummaranum av Børsens Nyheds Magasin. Blaðið umrøður í størri grein tann partin av stóra AP Møller samtakinum, sum tekst við olju og gass.

Í greinini í blaðnum verður greitt frá, hvussu væl gongst á altjóða oljupallinum hjá A. P. Møller og vit siggja kort yvir tey øki í heiminum, har fyritøkan er við í oljuframleiðslu og -leiting. Eitt av økjunum, sum fyritøkan vísir stóran áhuga, er Føroyar.

Her verður roknað við, at Mærsk verður við at bjóða uppá øki saman við einum belgiskum, einum amerikonskum og einum bretskum oljufelag.

Greinin snýr seg annars mest um væleydnaða arbeiðið í øðrum pørtum av heiminum, eitt nú Qatar og Algier og um vónirnar til nýggju leitingarøkinum í Kina, Thailandi, Indonesia og eisini Bretlandi.

Samhart Børsen satsar A. P. Møller samtakið stórar upphæddir uppá at finna olju í fjarskotnum londum, oftani eisini londum, sum liggja í ótryggum økjum politiskt.

Mærsk Posten

Herfyri boðaði oddamaðurin í A. P. Møller, Jens Søderberg í eini oddagrein í blaðnum „Mærsk Posten" frá, at málsetningurin er ein ljufuramleiðsla í útheiminum, sum um ár 2000 verður størri enn tann í Norðsjónum.

At stórur dentur í samtakinum verður lagdur á júst oljuleiting og framleiðslu sæst eisini av, at sjálvur Mærsk Mc Kinney Møller er formaður fyri Mærsk Olie og Gas.

Ein varislig meting sigur, at Mærsk eftir nøkrum árum fer at hava eina framleiðslu í útlandnum uppá góðar 60.000 tunnur av olju um dagin. Hetta svarar til 3,2 milliardir krónur í inntøku. Til sammetingar er framleiðslan hjá fyritøkuni í Norðsjónum 74.000 tunnur fyri 3,7 mia. kr. Afturat hesum kemur so gassframleiðslan.

Hesar metingar byggja tó bert uppá framleiðsluna í Qatar og Algier. Afturat hesum koma so møguligu komandi fund í Indonesia, Kina og Thailandi.

Børsen skrivar, at støðan hjá A. P. Møller sum altjóða oljufelag er nýggj. Tað eru bert tvey ár síðani, at framleiðslan byrjaði í Persiska Flógvanum. Harafturímóti eru tað 24 ár síðani, at A. P. Møller fór undir at pumpa fyrstu oljuna upp í Norðsjónum.

Samhart Børsen vilja fíggjarserfrøðingar ikki gera viðmerkingar til møguleikarnar hjá A. P. Møller at vinna pengar upp á íløgurnar í útlandinum. Hetta er alt ov torført og tí verður mett, at talan er um ein jokara, men væl at merkja ein jokara, sum kann koma at vísa seg at vera tann stóri vinnarin.

Altið varin

Hóast A P. Møller er sera varið við at seta tøl á fyri, hvat ein kann vænta av framleiðslu, so vísa tølini seg oftani at vera væl hægri enn mett, tá avtornar. T.d. vórðu í 95 pumpað 25% meira av olju og gassi upp í tí danska partinum av Norðsjónum, enn metingarnar søgdu fimm ár frammanundan.

Mett verður, at av kendu goymslunum, sum eru eftir í danska partinum av Norðsjónum, er parturin hjá A P Møller verður 12-14 mia kr.

So er spurningurin, hvussu stætt er í útlandinum.

A P Møller byrjaði framleiðslu í Qatar í 94-95 og tykjast her verða góðir møguleikar at økja framleiðsluna munandi. Í Algier verður framleiðslan at byrja í 97, og har sær tað eisini út til, at danska fyritøkan fer at kunna forvinna sær lítt av peningi.

Síðani eru fyritøkan við í leiting í fleiri øðrum londum, sum eitt nú Thailandi, Kina og í Indonesia umframt at á meira heimligum leiðum sum í týska og bretska partinum av Norðsjónum. Hvussu fer at gangast her er enn ov tíðliga at siga. Men tað er greitt, at A P. Møller satsar, tí í fleiri av londunum er politisk ótrygg viðurskifti. Eitt nú í Algier og Indonesia.

Tað verður annars í greinini ikki greitt nærri frá vónunum fyritøkan hevur til økini við Føroyar, men bert at A P Møller er við í einum samtaki. Hetta fevnir um belgiska Fina, amerikanska Union Texas og bretska Deminex.

Tað ljóðar, at A P Møller skal eiga nógvan partapening í hesum trimum oljufeløgunum, sum nú saman við Mærsk Olie og Gas ger tær neyðugu fyrireikingarnar fyri at vera við í tí fyrstu útbjóðingarrunduni við Føroyar. Tað er Fina, sum er operatørurur.

Bókhaldari til IRF

Søkt verður eftir einum bókhaldara til IRF, at byrja 1/3-97. Starvið er tíðaravmarkað til 2½ ár.

Tann, ið settur verður, kemur at taka sær av bókhaldinum og hjálpa til við skrivstovuarbeiðinum annars.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving og verkligar royndir innan hesi øki. Kunnleiki til telduarbeiði er ein treyt.

Stórur dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva við onnur.

Lønar- og setanarviðurskifti verða eftir galdandi sáttmála.

Skrivlig umsókn, saman við prógvum, skal vera okkum í hendi innan 1/2-97.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 43 343, Sólrun Poulsen.

IRF

Postboks 39
520 Leirvík

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan

Skrásetingar-nr. P/f 1811, **P/f Millum Heyga, 410 Kollafjørður**

Viðtøkur broyttar:
03.12.1996

Nýtt navn:
Sp/f Millum Heyga

Kapitalur:
Hækking við
kr. 278.000,00 til
kr. 289.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 278.000,00
til kurs 100

Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.

Endamál:
Endamál felagsins er at reka handil, útleigan og annað í hesum sambandi

Skráseting Føroya
tann 19. desember 1996

Kristin Balle